# TÍÐINDI

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800



## Nógv vilja byggja í Sandavági

Tað er stórur áhugi fyri at sleppa at búseta seg í Sandavági. Seinastu seks árini hevur kommunan selt 50 grundstykki og næstu seks árini verða eini 60 grundstykki og randarhús tøk afturat í Sandavági. Í hesum sambandi ætlar ein privat fyritøka at byggja 30 randarhús norðanfyri vakstrarhúsið í Miðvági. Men bygdaráðið ætlar eisini at útvega eini 60-70 nýggj grundstykki tey næstu árini tey næstu seks árini verða sostatt eini 90-100 nýggj grundstykki og hús til taks í Miðvági, sigur Rósa Samuelsen, borgarstjóri. Í hesum sambandi verður neyðugt skal bygdarætlanin broytast og fyri at kunna um tað, verður borgarafundur í næstum. Hon sigur, at eini 50-60 fólk mangla grundstykki, annars standa eini 100 fólk á bílilista at fáa grundstykki. Her er eisini talan um umsøkjarar, sum onki tilknýti hava til Vágar og borgarstjórin ivast ikki í, at tað er undirsjóvartunnilin, sum lokkar fólk vestureftir.

-áki-

# Ragnar syngur um tabu-evni

**Nú kemur triðja fløgan hjá Ragnari í Vík og á henni syngur hann um evni, vit vanliga ikki tosað hart um**

ÚTGÁVA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Leygardagin kemur Ragnar í Vík við nýggjari fløgu.

Fløgan hevur gingið heitið „Lagnulogin" og tað er Ragnar í Vík sjálvur, hevur gjørt orð og løg, og allir sangirnir eru á føroyskum, sigur hann í tíðindaskrivi.

Hetta er triðja fløgan hjá Ragnari í Vík. Tær báðar fyrru fløgurnar vóru á enskum, og vórðu so nógv spældar í útvarpum runt um í Evropa, at Ragnar í fleiri vikur lá á top 20 countrylistanum í Evropu og kom varð enntá nummar fýra við sanginum "You Broke Your Own Heart".

Við Lagnuloganum er Ragnar eisini slóðbrótandi, tí hann her syngur um evnir, ið vit vanliga ikki tosað alment um í Føroyum. Sangirnir eru um kenslur í sambandi við ymiskar hendingar á lívsleiðini.

Fløgan er tikin upp í Oyravox upptøkuhølunum í Nólsoy. Tónleikararnir eru Kim Hansen, Terji Rasmussen, Michael Thomsen, Jákup Zachariasen, Jákup Lützen, Bjarni Hansen og Súni Joensen.

Í bóklinginum, sum fylgir við fløguni, eru myndir, sum Randi Joensen hevur teknað.

Í sambandi við fløguna, heldur Ragnar í Vík útgávukonsert í Avhaldshúsinum í Haldórsvík leygarkvøldið klokkan 19.

Atgongumerki kosta 50 krónur og fáast við dyrnar og á konsertini ber eisini til at ogna sær eina fløgu við undirsrkiftini hjá Ragnari í Vík á.







Eg havi altíð hugsað í møguleikum
- og tað geri eg eisini nú

- Danskt virksemi úti í stóru verð kann lata nógvar gevandi dyr upp fyri føroyingar - um vit taka av møguleikunum.
- Sum nú er, eru vit ósjónlig.
- Vit skulu taka lut, tá danir hava vinnudagar í New York, Hong Kong, ella tá drotningin fer sjarmuferð til Japans.
- Sum fólkatingslimur skal eg vera við í ráðleggingarnevndum hjá donsku vinnuni, ella syrgja fyri, at føroyska vinnan verður umboðað í danska planleggingararbeiðinum. Eisini tá tað umræður norðurlendsku marknaðirnar.
- Eg vil við góðum grundgevingum sannføra føroysku vinnuna um, at tað kann løna seg at vera ein partur av meldrinum.
- Eg veit frá mínum arbeiði við marknaðarføring og fyriskipan, bæði her og uttanlands, at møguleikarnir eru endaleyst nógvir.
- Endamálið við mín fólkatingssessi er í síðsta enda at betra um livikorini og trivnaðin her á landi.

Og eg havi ein turkatrúgv uppá, at tað eisini í hesum sambandi ber til um ikki at flyta fjøll - so at flyta meiningar og at lata upp fyri møguleikum.

Fyri meg er tað ikki akseptabult, at eitt land meira ella minni stendur í stað...ella at fólk er fátæk. Land mítt skal blóma. Og eg eri hvørki romantisk ella sentimental, tá eg sigi hetta. Tað ber til. So stutt kann tað sigast.

www.ingvor.com

B